## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og eystri og stundum regn ella vátakavi. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og landsynningi og stundum regn ella vátakavi. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og landsynningi og ælingur, partvís vátakavi. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og suðri, stundum upp í ein strúk. Regn av og á og hitin millum 2 og 6 stig.

# Telduseyming



ÍTRIV

*Birita Andreasen*

– Hugurin at seyma liggur í blóðinum, sigur Helgi Laksáfoss, sum hevur havt hetta kvinnudámda ítriv í nærum hálva øld.

Í síðstu viku skipaði Husqvarna fyri einum reklamuskeiði, innan seyming, á Hotel Føroyum. Husqvarna er millum kendastu verksmiðjur ið gera seymimaskinur.

Tað sermerkta við skeiðnum er, at allar seymimaskinurnar eru teldustýrdar. Tær kunnu millum annað eisini brodera. Á maskinuni ber til at velja tað tilfar, ið ein vil brúka og síðani ber til at fáa upplýsingar um, hvørja nál og hvønn tráð ein skal nýta. Seymimaskinan kann samstarva teldu og internet á tann hátt, at til ber at heinta eitt nú mynstur á internetinum. Tekningar og myndir kunnu eisini skannast inn, og síðani leggur brúkarin sjálvur sting á.

– Tað er einans hugflogið ið setir mørkini, sigur Conny Møller, sum er seymiráðgevi hjá Husqvarna.

### Byrjaði at seyma saman við mammuni

Ein av luttakarunum á seymiskeiðnum er Helgi Laksáfoss. Hann er samstundis einasti maður, millum teir 12 luttakararnar. Hetta er honum tó ikki fremmant. Tvørturímóti; Helgi er gamal í garði, tá ið tað snýr seg um seyming. Allar seymimaskinurnar eru privatar, tað vil siga at hvør einstaki luttakari hevur sína seymimaskinu við heimanífrá. Og Helgi eigur sjálvandi eisini sína, sum hann er sera væl nøgdur við. Hann sigur frá, at hetta við at seyma, helst liggur í blóðinum. Hann er bert ein av teimum mongu í familjuni, ið dáma væl at seyma.

– Eg byrjaði at seyma saman við mammu míni í 1954. Eg seymi mest til mín sjálvs, men eisini hjálpi eg systrini. Annars er tað reint ítriv, sigur Helgi.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷17 |
| Nuuk | ÷8 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | ÷5 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷5 |
| Seyðisfjørður | ÷3 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 5 |
| Tromsø | ÷2 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 2 |
| Helsinki | ÷2 |
| Moskva | ÷3 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | ÷2 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 6 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 19 |
| Athen | 24 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 6 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 23 |
| Sydney | 25 |
| New York | 0 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 29 |
| Panama | – |
| La Paz | 8 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 996 hPa. eystan fyri Ísland stendur mestsum í stað og dýpist.




Lágtrýstið í landnyrðingi úr Íslandi fer í landnyrðing og grynnist.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/03 kl. 06[00]–27/03 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 4,3°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,9 mm – mált frá 26/03 kl. 06[00]–27/03 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mars: 45,2 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

20. mars: Mánin longst frá jørðini
25. mars: Tendring
1. apríl: Fyrra kvarter
5. apríl: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. mar | 09.55 | 22.16 | 08.55 | 21.16 | 09.10 | 21.31 | 11.55 | — | 00.34 | 12.55 | 08.10 | 20.31 | 07.10 | 19.31 | 10.10 | 22.31 | 11.10 | 23.31 | 09.40 | 22.01 | 10.55 | 23.16 |
| 29. mar | 10.39 | 23.02 | 09.39 | 22.02 | 09.54 | 22.17 | 00.16 | 12.39 | 01.16 | 13.39 | 08.54 | 21.17 | 07.54 | 20.17 | 10.54 | 23.17 | 11.54 | — | 10.24 | 22.47 | 11.39 | — |
| 30. mar | 11.26 | 23.50 | 10.26 | 22.50 | 10.41 | 23.05 | 01.02 | 13.26 | 02.02 | 14.26 | 09.41 | 22.05 | 08.41 | 21.05 | 11.41 | — | 00.17 | 12.41 | 11.11 | 23.35 | 00.02 | 12.26 |
| 31. mar | — | 12.16 | 11.16 | 23.42 | 11.31 | 23.57 | 01.50 | 14.16 | 02.50 | 15.16 | 10.31 | 22.57 | 09.31 | 21.57 | 00.05 | 12.31 | 01.05 | 13.31 | — | 12.01 | 00.50 | 13.16 |